Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jenis av Rana, løgtingsmaður

Svarari: Eyðdis Hartman Niclasen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Heilsumiðstøð og apotekið í Suðri

Spurningar:

1. Kann landsstýriskvinnan greiða frá, hvørjar ætlanir samgongan hevur viðvíkjandi bygging av heilsumiðstøð og umvæling av apotekinum í Suðri?

Viðmerkingar:
Bæði undir viðgerðini av fíggjarlógini og í sambandi við onnur kjak á Løgtingi er komið fram, at kommunur í Suðri hava ætlanir um bygging av læknamiðstøðum í oynni.

Serliga var undir viðgerðini av ársins fíggjarlóg hvast kjak um ætlanirnar at brúka eina tvísiffraða milliónaupphædd at umvæla gamla og soppafongda apoteksbygningin á Tvøroyri. Fleiri mæltu staðiliga frá hesum, tí mett varð skilabest á allan hátt at byggja nýtt apotek í einari nýggjari heilsumiðstøð.

Hesum ynskjum vísti táverandi landsstýriskvinnan avgjørd frá sær.

Nú onnur samgonga stjórnar Føroyum, og onnur landsstýriskvinna stjórnar heilsuøkinum, loyvi eg mær at spyrja, um sitandi samgonga hevur aðrar ætlanir bæði viðvíkjandi heilsumiðstøðum og apotekinum í Suðri, enn farna samgonga hevði. Og um so er, hvørjar hesar ætlanir so eru.

Á Løgtingi, 25. august 2026

Jenis av Rana